Diabetesfelagið

# Ársfrágreiðing 2023

Aðalfundurin 2022 varð hildin í Klaksvík, og eftir, at fundurin var lokin, hevði Brynhild Thomsen, kunningarfólk, eina sera áhugaverda samtalu við Odd Færø, sum er ættaður úr Klaksvík og búsitandi í Hoyvík.

Odd greiddi frá sínum lívi við typu1-diabetes ígjøgnum 50 ár.

## Fundir um diabetesstrongd

Tann 27. apríl 2023 varð skipað fyri tveimum fundum í samstarvi við Stenomiðstøðina. Evnið var Diabetes Distress, sum kann umsetast til diabetesstrongd á føroyskum. Ingrid Willaing Tapager, sum er professari á Stenomiðstøðini í Keypmannahavn, hevði fyrilestrarnar. Tann fyrri var fyri heilsustarvsfólk, og tann seinni var almennur. Mong heilsustarvsfólk møttu og hoyrdu um granskingina, sum Ingrid og onnur hava gjørt á økinum. Um kvøldið var veitsluhøllin á Landssjúkrahúsinum fullsett. Tað var púra greitt, at evnið á fundinum hevði stóran áhuga millum fólk við diabetes og teirra avvarandi. Nógvir spurningar vórðu settir eftir Framløguna, og fleiri høvdu á munni, at tey ongantíð høvdu hoyrt nakað heilsustarvsfólk sett so beinrakið orð á, hvussu tað er at liva við diabetes.

## Spurnarkanning um Steno-miðstøðina

Í summar fingu fólk, sum eru knýtt at Stenomiðstøðini, høvi at svara spurnarblaði um, hvussu nýggi bygningurin skal innrættast.

Eisini fingu tey vaksnu við typu1-diabetes eitt spurnarblað frá Stenomiðstøðini, sum í samstarvi við Vanju Klein Olsen, masterlesandi í heilsuvísindum, og Diabetesfelagið, vildi kanna, hvussu stóð til við diabetesstrongd og nøgdsemi við viðgerðina á miðstøðini. Vanja vardi sína ritgerð í februar, og fer eftir aðalfundin í dag at leggja úrslitini fram fyri okkum, sum eru møtt her.

## Vitjan frá IDF Europe

Elisabeth Dupont, Regional Manager (økisleiðari) hjá IDF, var í Føroyum í sambandi

við vinnuferðavinnuráðstevnu hjá Visit Faroe Islands. Í tí sambandi hitti nevndin í Diabetesfelagnum Elisabeth, har vit greiddu frá um okkara virksemi og um støðuna við diabetes í Føroyum. Elisabeth var glað fyri høvið, og vit mugu sanna, at eitt týdningarmikið samband varð knýtt, og tað hevur heilt víst longu verið við til at fremja okkara samstarv við IDF-skrivstovuna í Brússel.

# Ozempic og hækking av egingjaldi

Síðsta summar vóru mong, sum gjørdu vart við, at tað var trupult at fáa hendur á heilivágnum, Ozempic, sum verður brúktur í viðgerðini av typu2-diabetes. Diabetesfelagið var tá alment frammi við áheitan um, at heilivágurin fyrst og fremst eigur at vera brúktur til fólk við diabetes og ikki sum klænkiheilivágur, sum hann eisini kann verða brúktur til.

Í heyst legði landstýriskvinnan í heilsumálum uppskot fyri løgtingið um at hækka egingjaldið til heilivág. Diabetesfelagið mótmælti beinanvegin, eins og mong onnur sjúkligafeløg, og hóast løgtingið at enda samtykti at hækka gjaldið nakað, so bleiv hækkingin tíbetur ikki so stór sum upprunaliga ætlað.

# Nordic Forum

Í august var Nordic Forum í Stockholm. Trý umboð vóru við frá Diabetesfelagnum, Terji á Lakjuni, Bára Joensen, sum umboðaði tey ungu í felagnum, og eg sjálv. Skráin varð skipað við fakligum innihaldi um skrásetingarskipanir í Svøríki, heilsuøkonomi og diabetes osv. Seinna dagin arbeiddu vit í verkstovum og løgdu fram hvør fyri øðrum um ymisk viðurskifti, sum gera seg galdandi hjá fólki við diabetes. Hetta vóru gevandi dagar, har nógv mál vórðu umrødd og sambond vóru knýtt, sum gera, at vit lættari kunnu fáa orð hvør á annan, tá tørvur er á tí.

Norðurlendska samstarvið er framvegis sera gott og gevandi fyri okkum í Diabetesfelagnum.

# Altjóða diabetesdagurin

Á altjóða diabetesdegnum varð skipað fyri altjóða webinari (WDD joint IDF Europe-dedoc event), har fólk úr ymsum tjóðum og heimspørtum tóku lut og løgdu fram aktuel evni.

Diabetesfelagið

Forkvinnan í Diabetesfelagnum var millum teirra, sum løgdu fram og greiddi frá, hvat rørir seg á diabetesøkinum í Føroyum, og hvørjar framtíðarætlanir eru.

## Diabetes og kynslív

21. november skipaðu vit fyri altjóða diabetesdegi í veitsluhøllini á Landssjúkrahúsinum undir heitinum 'Diabetes og kynslív'. Hetta var eitt tiltak, sum varð hildið saman við Stenomiðstøðini. Jóhan Poulsen, urologur, og tveir danskir sexologar, Anette Højer Mikkelsen og Birgitte Schantz Laursen løgdu fram. Eisini hevði Anita Højgaard, diætistur, eina framløgu um diabetes og kost.

Væl av fólki var komið saman til tiltakið.

## IDF Europe

28. november var aðalfundurin hjá IDF-Europe hildin í Beograd, har Allan Skaalum og forkvinnan luttóku. Seinnapartin tann 28. og allan 29. november var toppfundur um diabetesviðgerð, sum IDF og WHO skipaðu fyri (TEAM meeting and High-Level Technical Summit on diabetes in collaboration with WHO Europe).

Hetta vóru tveir dagar, sum vóru á tremur við nógvum og áhugaverdum framløgum, við granskarum, fólkum, sum sjálvi høvdu diabetes o.ø. At enda varð ein yvirlýsing undirskrivað, sum vil skunda undir handlingar, sum binda til at betra um møguleikarnar at finna fólk við diabetes og eisini at bøta um góðskuna av viðgerð og røkt. Yvirlýsingin eitur ***Declaration on accelerating action on commitments to improve diabetes detection and quality of care.***

Tað var ein hátíðarløta, tá umboðini fyri IDF og WHO undirskrivaðu skjølini, og øll limafeløgini tóku undir við ætlanini.

Diabetesfelagið arbeiðir nú við at føroyska punktini í hesi yvirlýsing og fer at leggja tey fram fyri landstýriskvinnuni í heilsumálum, tá vit eru komin á mál við arbeiðinum.

Tórshavn 13.03.24

May-Britt Skoradal, forkvinna